### *Tekstir um sáttargerð í QR-kodum*

| | |
|---|---|
| Havurin skal tá bera á sær allar misgerðir teirra út á óbygt land; hann skal verða sleptur út í oyðimørkina. | |
| 3 Mós 16,22 | |
| Og Guð segði: «Hetta skal vera merki sáttmálans, sum eg geri millum mín og tykkara og allar livandi skepnur, ið hjá tykkum eru, fyri øll komandi ættarlið: Boga mín seti eg í skýggið; og hann skal vera sáttmálamerkið ímillum meg og jørðina. | |
| 1 Mós 9,12-13 | |
| Eg, eg eina, striki út misgerðir tínar vegna mín sjálvs og minnist ikki syndir tínar. | |
| Jes 43,25 | |

| | |
|---|---|
| Eg man fyrigeva misgerð teirra og ikki meira minnast á syndir teirra. | |
| Jer 31,34 | |
| Vit vita hetta, at okkara gamla menniskja er krossfest við honum, fyri at syndalikamið skuldi verða til einkis, so at vit ikki longur skulu tæna syndini. | |
| Rom 6,6 | |
| men nú eru vit leys frá lógini, við tað at vit eru deyð frá tí, sum vit áður vóru bundin í | |
| Rom 7,6 | |
| Hann bar syndina hjá mongum og bað fyri misgerðarmonnum. | |
| Jes 53,12 | |

| | |
|---|---|
| Men hann varð særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av sárum hans fingu vit heilsubót. | |
| Jes 53,5 | |
| Tá ið vit vóru fíggindar, vórðu vit sátt við Guð við deyða sonar hansara. | |
| Rom 5,10 | |
| Men alt er frá Guði, sum gjørdi okkum sáttar við seg við Kristi og gav okkum sáttargerðartænastuna; við tað at tað var Guð, sum í Kristi gjørdi heimin sáttan við seg, og hann tilroknar teimum ikki misgerðir teirra, og hevur lagt orðið um sáttargerðina niður í okkum. | |
| 2 Kor 5,19 | |

| | |
|---|---|
| Tí at so elskaði Guð heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív. | |
| Joh 3,16 | |
| Í hesum er kærleikin: Ikki at vit elskaðu Guð, men at hann elskaði okkum og sendi son sín til at vera bót fyri syndir okkara. | |
| 1 Joh 4,10 | |

| | |
|---|---|
| Faðirin segði: »Sonur mín, tú ert altíð hjá mær, og alt mítt er títt; men nú áttu vit at hildið okkum at gamni og at verið glaðir, tí at hesin bróðir tín var deyður og er livnaður aftur, var farin og er fingin aftur. | |
| Luk 15,31-32 | |
| Soleiðis skulu tit eisini halda tykkum sjálv vera deyð fyri syndini, men livandi fyri Guði í Kristi Jesusi. | |
| Rom 6,11 | |

| | |
|---|---|
| Tí at ikki sendi Guð sonin í heimin, til tess at hann skal døma heimin, men til tess at heimurin skal verða frelstur við honum. | |
| Joh 3,17 | |
| Um tú kanst koma til sættis við ein frá konfirmantholdinum og vísa tað fyri prestinum, so fært tú heiðurslløn. | |
| Um forsoning í denstoredanske.dk | |

| | |
|---|---|
| Stuttfilmur um sáttargerð<br>https://www.youtube.com/watch?v=Pp25LuLaD9c | |